

Færøernes Mellem- og Realskole:

# Kennir nakar hesi ?

Hendan myndin er av børnum og lærarum í fyrsta ella øðrum millumskúlaflokki umleið 1917.

Tey einastu vit vita nakað um eru lærarafólkini á fremra rað f.v.: Kristoffersen, Jødal, J. Lauritsen (fer frá í 1918, yvirlærari 1903-18), Olaf Skaalum og frøken Rafn.

Um onkur veit meira um hesa myndina og kennir nøvn á børnum á myndini er viðkomandi vælkomin at kontakta Jórunn Dánialsdóttir. **Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Tel. 316024 ella 226024.**

Jórunn fer at skipa fyri eini framsýning á ólavsøku í ár í Kommunuskúlanum í Havn. Framsýningin letur upp við eini kvøldsetu tann 23. juli kl. 19.00 har ymisk fólk koma at hugleiða um skúlatíðina. Borgarstjórin Heðin Mortensen fer at seta framsýningina, sum verður opin hvønn dag til og við 5. august kl. 20.00. Annars verða tíðirnar, tá opið er, nærri lýstar seinni.

**Tíðarfreistin til at koma við myndum er sett til 10. juni, og vónar Jórunn at fáa allar myndirnar til høldar til tað tíð. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).**

*Myndaeigari: Føroya Fornminnissavn*


